

## So er navnið Mortanshavn

Nú báðir persónarnir, sum eiga vinnubygningarnar á nýggja ídnaðarøkinum Inni á Rætt á Toftum eita Mortan, hava fólk longu givið økinum navnið »Mortanshavn«

Fólk í summum bygdum eru ivaleyst meiri enn onnur kend fyri at geva nøvn – ella kelinøvn, um vit vakurt kunnu rópa tað so.

Um fólk í Nes kommunu endiliga eru raskari enn onnur í so máta, fara vit tó at ivast í.

Men nú MJ Saltsøla við Mortani Johannesen er farin undir at byggja sína nýggju saltgoymslu á ídnaðarøkinum Inni á Rætt á Toftum – og Mortan Højgaard júst hevur keypt tveir vinnubygningar á sama ídnaðarøki, hava fólk í kommununi longu givið hesun nýggja ídnaðarøki navn.

Og navnið er Mortanshavn, hvørki meiri ella minni!

Enn er eingin havn komin Inni á Rætt, men hon fer at koma, tá fíggjarliga rásarúmið hjá Nes kommunu verður nakað betri, enn tað er í dag.

Saltgoymslan, sum verður bygd á økinum, hevur brúk fyri einum bryggjukanti, tá salt kemur til bygdar, men í byrjanini verður eingin atløga.

Saltið verður skipað upp longur úti á havnalagnum og verður koyrt Inn á Rætt, har nýggja goymslan hjá MJ Saltsølu nú verður bygt.

Tíðin fer at vísa, um Mortanshavn verður navnið – ella, um fólk í framtíðini fara at rópa hetta Inni á Rætt.

*vilmund@sosialurin.fo*

# Tjaldursalkotek




Pál Weihe vil hava Rúsdrekkasøluna undir Heilsumálaráðið

## Í MORGIN

**5/8 °C**



9-14 m/s 9-14 m/s

Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og suðri og regn ella mjørki av og á. Hitin millum 11 og 14 stig.

## MIKUDAGIN

**5/8 °C**



5-10 m/s 5-10 m/s

Gul til stívt andøvsgul av suðri og útsynningi og regn ella mjørki av og á. Hitin millum 11 og 14 stig.

## HÓSDAGIN

**5/8 °C**



5-10 m/s 5-10 m/s

Gul til stívt andøvsgul av suðri og regn ella sirm av og á. Hitin millum 11 og 14 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og stundum regn. Hitin millum 10 og 14 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ



**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 1009 hPa. vestan fyri Írland fer í útnyrðing og dýpist nógv.



**Komandi nátt:**
Stormlágtrýstið í útsynning úr Íslandi stendur mestsum í stað og grynnist. Brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum týsdagin.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 94 mm

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nuuk | 5 | Tromsø | 6 | Moskva | 16 | Athen | 26 |
| Reykjavík | 11 | Bergen | 12 | Berlin | 25 | Beijing | 30 |
| Tórshavn | 10 | Oslo | 22 | Paris | 20 | New Dehli | 30 |
| Lerwick | 9 | Stokkhólm | 20 | Madrid | 28 | Bangkok | 34 |
| Aberdeen | 12 | Keypmannah. | 19 | Róm | 26 | Sydney | 14 |
| London | 19 | Helsinki | 16 | Malorca | 26 | New York | 33 |



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

## VESTFALLSKYRRINDI

21. sept Mánin longst frá jørðini
23. sept Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 22. sept | 06:40 | 18:58 | 05:40 | 17:58 | 05:55 | 18:13 | 08:40 | 20:58 | 09:40 | 21:58 | 04:55 | 17:13 | 03:55 | 16:13 | 06:55 | 19:13 | 07:55 | 20:13 | 06:25 | 18:43 | 07:40 | 19:58 |
| 23. sept | 07:16 | 19:33 | 06:16 | 18:33 | 06:31 | 18:48 | 09:16 | 21:33 | 10:16 | 22:33 | 05:31 | 17:48 | 04:31 | 16:48 | 07:31 | 19:48 | 08:31 | 20:48 | 07:01 | 19:18 | 08:16 | 20:33 |
| 24. sept | 07:51 | 20:09 | 06:51 | 19:09 | 07:06 | 19:24 | 09:51 | 22:09 | 10:51 | 23:09 | 06:06 | 18:24 | 05:06 | 17:24 | 08:06 | 20:24 | 09:06 | 21:24 | 07:36 | 19:54 | 08:51 | 21:09 |
| 25. sept | 08:28 | 20:47 | 07:28 | 19:47 | 07:43 | 20:02 | 10:28 | 22:47 | 11:28 | 23:47 | 06:43 | 19:02 | 05:43 | 18:02 | 08:43 | 21:02 | 09:43 | 22:02 | 08:13 | 20:32 | 09:28 | 21:47 |
| 26. sept | 09:07 | 21:27 | 08:07 | 20:27 | 08:22 | 20:42 | 11:07 | 23:27 | - | 12:07 | 07:22 | 19:42 | 06:22 | 18:42 | 09:22 | 21:42 | 10:22 | 22:42 | 08:52 | 21:12 | 10:07 | 22:27 |